# ÁRSINS VITANARFRÓÐU



## SPURDÓMUR HVUSSU VIRKA VISKILEÐUR

Granskarar: 4.b í Eysturskúlanum

# INNGANGUR

Vit brúka viskileður hvønn dag í skúlanum. Tað er gott at brúka, tá ið vit skriva okkurt skeift. Tá kunnu vit fáa tað vekk við einum viskileðri. Kann tað viska nakað annað og kann nakað annað viska blýantstrikur. Hetta fara vit at kanna og spyrja: Hvussu virka viskileður?

Lærari:

Joan Andrea Jógvansdóttir, joan.jogvansdottir@skulin.fo

Luttakarar:

Ejler, Bára, Tita, Lilja, Liljan, Hanna Rósa, Tóra Bjørk, Filip, Daniel Petur, Beinta, Suffía, Sára, Gunnhild, Brynja, Heidi, Halla, Artur, Jóhannes, Natalie.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á HVUSSU VIRKA VISKILEÐUR

Hví eru viskileður so gummislig? Hvussu kann viskileður bogna uttan at brotna

Hví hava viskileður litir, um tað ikki kann vísast, tá ið man viskar og hví riggar tað ikki at viska farviblýant. Hví er tað lættari at viska nakrar strikur enn aðrar, og hví eru nøkur viskileður betri enn onnur.

Hetta undrast vit á: hvussu rigga viskileður?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Viskileður eru gjørd til at viska vanligan blýant, men ikki farviblýant

Viskileður er okkurt gummi, og tí brotnar tað ikki so lætt

Viskileður kann hava nógvar litir, men pappír fær ikki lit av viskileðrinum

Man kann ikki viska penn, men viskileður er gjørt til at viska blýant

Viskileður kann viska onkrar aðrar svartar strikur

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

Fyrst tekna vit eina talvu og so gera vit ein punt við blíantstift. fyrst leyst og so medium, hart og super hart.

So fara vit at viska farviblýant.

Vit fara at prøva at viska eitt silvurfat, sum er blivið svart

Um viskileður er gummi, so riggar tað eisini at viska við springbólti. Tí fara vit at viska við einum springbólti

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR



Tað sum vann var faber-castel viskuleðuri, men tað sum var numar tvey var eitt lítið hvíttviskileður.



Tað riggar ikki at viska farviblýant.

Pappírið fær ikki nakran lit av viskileðrinum



Viskileður kann viska svart av silvur.



Tað riggar at viska við springbóltinum eina løtu, men hann blívur svartur, og kann ikki brúkast sum viskileður



Tað riggar at viska við fingrinum, men bara eina løtu, tí hann blívur svartur



Um man viskar for hart, so skrædnar pappírið

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Viskileður er gummisligt. Tað viskar blýantstrikur, men kann ikki viska litblýant.

Faber Castel viskileðrið var tað besta av teimum, sum vit brúktu

Viskileðrið missur pettir av. Um tað ikki gjørdi tað, so hevði tað verið so skitið, og so hevði pappírið blivið svart. Tað var tað sum hendi við springbóltinum. Hann viskaði blýantstrikur, men bleiv skitin av tí.

Viskileður gníggjar blýantstrikurnar vekk. Tað kunnu vit eisini gera við fingrinum, tá ið vit skriva á borðið. Tá blívur fingurin skitin. Viskileður, sum missir pettri av ger tað, so tað ikki skal vera so skiti. Tey viskileðrini, sum ikki missa so nógv petti av eru skitnari og rigga ikki so væl.

So viskileður virka við at man gníggjar strikurnar vekk og so detta smá svørt pettir av viskileðrinum. Um pettir ikki fara av, so blívur tað svart, og riggar ikki líka væl.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit fara at leggja hetta fram til næsta glotta í miðdeildini í Eysturskúlanum